


## Ronaldinho fær av at vita

Atfinningarnar ímóti stóru stjørnuni á brasilska landsliðnum, Ronaldinho, eru sera harðar, nú Brasil reyk úr HM-kappingin nógv fyrri enn væntað. Undan endaspælinum var roknað við, at Ronaldinho skuldi fara at vísa seg sum besta spælaran í kappingini, men soleiðis var ikki. Og leygardagin spældi Ronaldinho ein taman dyst ímóti Fraklandi

– Hann spældi illa, hann dribblaði ikki, skjeyt ikki, rakti ikki viðspælarar, og hann tók ongantíð ábyrgd, skrivar blaðið Estado de Sao Paulo.

## Djorkaeff mátti lúgva

Franski fótbóltsspælarin Youri Djorkaeff var millum áskoðararnar, tá ið Frakland leygarkvøldið vann fjórðingsfinaluna ímóti Brasil. Men sambært felagi hansara í USA, New York Red Bull, fór ikki alt rætt fram, tá ið Djorkaeff rýmdi úr New York. Djorkaeff hevði sagt felagi sínum frá, at hann hevði álvarsamar trupulleikar í familjuni, og tí mátti hann fara heim. Hetta var honum játtað, men tá ið amerikanska felagið sá hann aftur, sæt franski spælarin smílandi á áskoðaraplássunum til dystin millum Frakland og Brasil. Í New York Red Bull halda tey, at Djorkaeff hevur logið fyri teimum, og hann kann væntað sær eina heita móttøku, tá ið hann kemur aftur til New York.

### Mangla bara málini

Alexandur Johansen, sum hesa ferð var sentralur á framrættaða miðvøllinum hjá Skála, iðraði seg um, at tað ikki eydnaðist teimum at avgera dystin móti GÍ.

– Spælið hjá okkum byrjar at síggja heilt gott út nú. Móti GÍ bæði trýstu og skaptu vit nógv, men vit megna tó ikki at skora. Helt orsaða av eini blanding av góðum málmansspæli og vánaligum avslutningum. Tað tykist, sum eru vit ikki nóg kaldir í avgerandi løtunum, og tað er kanska júst tað, sum er munurin, um hugt verður at topp- og botnliðum.

**-mørk**

### Meitilberg til Eiðis

Í vikuskiftisútgávu okkara skrivaðu vit, at Jørgin Meitilberg skuldi hvessa B68-álopið hetta kappingarárið.

Hesi tíðindi høvdu vit fingið váttað av Toftum, men tað vísti seg kortini ikki at vera hald í hesum.

Fríggjadagin stóð nevnliga greitt, at spælarin ístaðin hevði tikið av einum tilboði frá EB/Streymi. Nakað sum kom ikki sørt óvart á toftamenn, sum annars ætlaðu sær at hava nýggja mannin við í hópinum til komandi dystin. Tann dysturin verður spældur í kvøld, og er tað júst EB/Streymur – við Jørgin Meitilberg í hópinum – sum tá tekur ímóti.

**-mørk**

Skála-GÍ 0-0:

# Marginalarnir fylgja toppinum

Skála: 3 – GÍ: 2

*Skála*

*GÍ*

**Skála sýndi sunnudagin nakað av spælinum, sum tey bæði seinnu árini lyfti liðið móti oddinum. Men teir máttu ásanna, at ert tú partur av botnstríðnum, so eru marginalarnir sjáldan í tínum parti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Skála hevði í longum løtum takið á GÍ, men effektiviteturin í álopspartinum restaði, og so endaði alt eins málleyst, sum tað byrjaði*

*savnsmynd*

Gøtumenn tóktist merktir av strævna dystinum móti KÍ hóskvøldið, tá teir runnu á vøllin á Skála sunnudagin. GÍ hevur annars støðugt verið eitt av liðunum, sum hevur amast heilt uppi at oddasessinum, men síðani teir rukku hesum, tykist bara hava gingið afturá.

Sunnudagurin skuldi helst brúkast til eina vend í so máta, men skulu gøtumenn síggja nakað positivt í dystinum, so er tað helst, at teimum eydnaðist at fáa stig við sær.

### Skála hevði møguleikarnar

Skála sat nevnliga á tí allar mesta frá dystarbyrjan. Nú liðið aftur er um at vera fullmannað, tykjast teir spakuliga vera við at finna gomlu taktirnar framaftu. Við Paula G. Hansen sum kontrollerandi stýrimanni á miðvøllinum varð í løtum lagt stórt trýst á GÍ-málið, og fleri ferðir spurdust møguleikar eisini burturúr.

Fyrstu løtuna vóru gestirnir annars væl við, men spakuliga tóku vertirnir seg alt longur fram á vøllin. Teir áttu eisini størsta møguleikan, tá Bogi Gregersen varð spældur púrasta blankur, men skotið fór beint í krovið á Turi Geza.

Geza mundi eisini vera tann spælarin hjá GÍ, sum stóð sterkastur í myndini, tí so hvørt, sum minnuttirnir gingu, gjørdist yvirvágin hjá heimaliðnum alt størri. Einar tvær-tríggjar ferðir afturat gjørdist talan eisini um møguleikar, sum mugu roknast upp í 100% flokkin, men nærri enn einum skoti á stongina komu teir tó ikki. Og í so máta var talan um eitt symptomatiskt avrik hjá einum liði, sum í ár stríðast fyri at sleppa úr botninum, heldur enn at hugsa um heiðursmerki.

### Gunnar mundi avgjørt

Og vildi heilt illa til, so kundi verið galin endi hjá Skála. Tí tá teir ikki megnaðu at skora, byrjaði GÍ at svara aftur. Fyri tað mesta varð hetta gjørt við longum bóltum niðan til Gunnar Nielsen, sum so mátti royna síni kynstur, og í yvirtíðini mundi hetta givið úrslit. Men vakra saksasparkið endaði á ovara partinum av tvørtrænum, og so var tann møguleikin farin.

At satsa álopsspælið einvíst upp á evnini hjá Gunnari tykist annars vera ein ikki heilt optimal loysn hjá GÍ. Áður hevur annars ligið væl fyri at toga miðvøllin fram við í álopsroyndunum, men tann parturin var at kalla eiðasørur sunnudagin.

### Lagnudystir í væntu

Enn hongur liðið tó toluliga væl í oddinum, men skal hetta halda, verður skjótt neyðugt við sigrum. Ikki minst, tá EB/Streymur kemur í Sarpugerði komandi sunnudag í einum dysti, sum væl kann gerast eitt slag av skiljirist í oddastríðnum.

Skála hevur í sín part framvegis tungt við at sleppa úr botnstríðnum. Seinastu vikurnar hava taktirnar í spælinum annars verið á heilt góðari leið, men málini hava tó trotið. Hjá teimum verður talan um útidyst móti KÍ komandi vikuskiftið, og skal nakað munagott spyrjast úr hesum, verður neyðugt við í minsta lagi eins góðum avriki sum hesaferð, og – helst – málum afturat.